Ítróttar
Sosialurin
Nr. 103 • mikudagur • 31. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

**Hvør kemur víðari úr Bólki B**

| | |
|---|---|
| Ongland & Svøríki | 1,40 |
| Ongland & Paraguay | 3,00 |
| Ongland & Trinidad & Tobago | 9,50 |
| Svøríki & Paraguay | 7,50 |
| Svøríki & Trinidad & Tobago | 30,00 |
| Paraguay & Trinidad & Tobago | 65,00 |

## Bólkur B

### ONGLAND

**Málverjar**
Paul Robinson
David James
Scott Carson

**Verja**
Ben Foster
Gary Neville
Ashley Cole
Jamie Carragher
Rio Ferdinand
John Terry
Wayne Bridge
Phil Neville
Michael Dawson
Sol Campbell

**Miðvøllur**
David Beckham
Frank Lampard
Steven Gerrard
Joe Cole
Owen Hargreaves
Michael Carrick
Jermaine Jenas
Aaron Lennon
Stewart Downing

**Álop**
Wayne Rooney
Michael Owen
The Walcott
Peter Crouch
Jermaine Defoe
Andrew Johnson

### PARAGUAY

**Málverjar**
Justo Villar
Derlis Gomez
Aldo Bobadilla

**Verja**
Jorge Nunez
Delio Toledo
Carlos Gamarra
Julio Cesar Caceres
Paulo Da Silva
Julio Manzur
Denis Caniza

**Miðvøllur**
Carlos Bonet
Edgar Barreto
Roberto Acuna
Diego Gavilan
Carlos Paredes
Christian Riveros
Jose Montiel
Julio Dos Santos

**Álop**
Salvador Cabanas
Roque Santa Cruz
Nelson Valdez
Jose Cardozo
Nelson Cuevas

### SVØRÍKI

**Málverjar**
Andreas Isakson
John Alvbäge
Rami Shaaban

**Verja**
Olof Mellberg
Teddy Lukic
Erik Edman
Petter Hansson
Fredrik Stenman
Karl Svensson
Markus Rosenberg

**Miðvøllur**
Mikael Nilsson
Tobias Linderoth
Niclas Alexandersson
Anders Svensson
Kim Kallstrøm
Daniel Anderson
Christian Wilhemsson

**Álop**
Zlatan Ibrahimovic
Henrik Larsson
Johan Elmander
Mattias Jönson
Marcus Allbäk

### TRINIDAD & TOBAGO

**Málverjar**
Shaka Hislop
Kelvin Jack
Clayton Ince

**Verja**
Ian Cox
Avery John
Marvin Andrews
Brent Sancho
Dennis Lawrence
Cyd Gray
Atiba Charles

**Miðvøllur**
Christopher Birchall
Aurtis Whitley
Russel Latapy
Carlos Edwards
Silvio Spann
Densill Theobold
Anthony Wolfe
Erwin Wise

**Álop**
Collin Samuel
Cornell Glenn
Stern John
Kenwyne Jones
Dwight Yorke
Jason Scotland

# Heimsins kendasti fótur



*Bretar biðja til, at fóturin hjá Rooney verður klárur til HM-endaspælið. Hendan myndin er tó tikin á Madame Tussaus savninum í London*
*Mynd: Scanpix*

**Alt Ongland heldur ondini. Vónin er, at Wayne Rooney kann spæla, tá farið verður undir knock-out partin av HM. Men fyrst skal landið altso spæla seg víðari**

HM-BÓLKUR B
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann er enn bara 20 ára gamal, men longu nú verður hann mettur sum kanska týdningarmesti spælarin á enska landsliðnum. At Lampard í fjør varð mettur millum teir tríggjar bestu í heiminum, og at Gerrard eisini verður roknaður í sama mátistokki, rørir ikki fólkið.

Nei, ikki ein gongd skiftandi hársniðið hjá David Beckham fær í løtuni størri umrøðu enn heimsins kendasti skaði. Brotið, sum Rooney fekk, tá Manchester United í triðja seinasta umfarinum í Premier League spældi á útivølli móti Chelsea, hevur verið á breddanum hvønn dag síðani. Mest sum hvønn dag hava viðmerkingar frá ymsum serfrøðingum verið at sæð, og skanningarnar av fótinum hava mest sum verið átøkar tjóðarhátíðum. Ikki minst, tá hesar støðugt hava sýnt góð úrslit.

### Viðkvæmir

Tjóðin er ikki í iva um, at uttan stjørnuskotið úr Merseyside, er vónleyst at vinna HM, og tað kunnu tey kanska hava rætt í. Tí hóast sjálvsfatanin í Onglandi er sera stór, og hóast liðið telur nakrar einstaklingar, sum avgjørt eru í heimstoppinum, so eru flestu serfrøðingar á einum máli um, at favorittar eru onglendingarnir á ongan hátt.

At Rooney í besta føri verður tøkur, tá farið verður undir 1/8-finalurnar, er neyvan optimalt fyri venjingarstøðuna. Og álopstrupulleikarnir gerast ikki minni av, at Michael Owen eisini hevur trupulleikar við at koma seg heilt - eisini eftir beinbrot. Við tveir metra langa Peter Crouch, og Arsenal-eykamanninum, Theo Walcott, at taka til, kann tá skjótt henda, at álopið verður dekan ov tunt.

Miðvøllurin er kanska millum teir sterkastu í heiminum, har Gerrard og Lampard taka sentralu plássini. Og har Beckham so kann senda síni neyvu innlegg úr høgru, meðan Joe Cole kanska er loysnin upp á kroniska trupulleikan, sum bretar hava havt í vinstra borði. Í Paul Robinson hevur liðið eisini ein málverja av teimum frægu, meðan verjan við Terry, Ferdinand, Neville og Cole eisini tykist hampuliga sterk.

Venjarin er heldur eingin óroyndur maður, men størsti trupulleikin hjá Sven-Goran Erikson er helst, at meðan hann í teimum fyrstu ellivu hevur eitt framúr lið, so er liðið langt ífrá eins sterkt, um spælarar fella frá. Á miðvøllinum er tað væl bert Owen Hargreaves, ið hevur roynt seg á sama støði, sum teir fyrstu fýra, og bæði í álopi og verju tykist vera so sum so við alternativum, um skaðar ella leikbann gera um seg.